Fuglafjørður 27-06-2011

Til róðrarfeløgini!

Leygardagin 2. juli verður skipað fyri FM kappróðri á Varmakeldustevnu í Fuglafirði, og vilja vit hervið bjóða øllum manningum at vera hjartaliga vælkomnum.

**Bátarnir skulu standa**

- Frammanfyri bygningin hjá *P/f Petur Larsen* og *Egningarmiðstøðina*. Bygningarnir standa fyrst fyri, tá ið tit koma oman á kai økið. Lastbilarnir skulu bert seta bátarnar av, fyri síðani at parkera við Handils og frystivirkið (á kaiini) og norður móti Havsbrún

**Bátadrátturin**

- Drátturin er millum *P/f Petur Larsen bygningin* og *bedingina*

**Numrini**

- Numrini verða útflýggjað í bátahøllini (í kappróðrarneystinum), sum er beint við dráttin

**WC**

- Er í *Egningarmiðstøðini*

**Matur**

- Matseðlar verða útflýggjaðir í bátahøllini. Matur verður borðreiddur í venjingarhølinum í kappróðrarneystinum

**Róður**

- Barnaróðurin byrjar kl. **13.00** og FM róður byrjar kl. **15.00** stundisliga.

**Manningaskifti**

- Manningaskifti verður IKKI á dráttinum, men á eini flotbrúgv, ið er við kaiina yvirav (tekur uml. 4 min. at ganga hartil frá dráttinum)

**Old girls & Old boys**

- Um fleiri bátar tekna seg, verður skipað fyri *old girls* og *old boys* róðri. Rógvið verður 1000 metrar. Tilmelding skal fara fram áðrenn mikukvøldið á midnátt á tlf. 226 114

**Steypahandanin**

- Steypahandanin verður omanfyri kappróðrarneystið.

**Ferðasteyp**

- Tey feløg, ið hava ferðasteyp í varðveitslu, verða biðin um at lata tey inn, har numrini verða útflýggjað (í bátahøllini). Um okkurt felag hevur vunnið ferðasteypið til ognar, verða tit biðin um at siga frá skjótast gjørligt.

Heitt verður á feløgini um at bera upplýsningarnir víðari til róðrarfólkið.

Kort yvir róðrarøkið liggur á http://rsf.fo/Eystanstevna.html

Við kappróðrar kvøðu

ÍF Kappróður
Tlf 226 112
*Dávur Juul og Ingi á Tórgarði*